# Havstovan søkir eftir
# maskinmeistara til Jákup Sverra




## Farloyvisstarv sum maskinmeistari til havrannsóknarskipið Jákup Sverra

**Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til:**

**Erling í Líða**
*Reiðari*

erlingl@hav.fo
tel. 79 39 01

ella

**Jónsvein Joensen**
*Maskinstjóri*
jonsveinj@hav.fo
tel. 22 76 76

Havstovan sóknast eftir skikkaðum maskinmeistara til havrannsóknarskipið Jákup Sverra.

Talan er um eitt farloyvisstarv frá 1. februar - 31. desember 2023.

Tann, ið settur verður, skal í minsta lagi hava fylgjandi útbúgving og førleikar:

- Vinnubræv sum „Chief Engineer“ Reg. III/3 Chief Engineer
- Trygdarskeið, Brandleiðara-skeið, Roykkavara-skeið og FRC-skeið
- Heilsuváttan fyri sjófólk
- Málførleikar á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góð samstarvsevnir

Tað er ein fyrimunur at tann, ið settur verður, hevur royndir við teirri tøkni, ið er umborð á slíkum framkomnum skipi, tað verið seg bæði innan maskin-tøkni og eltøkni.

### Lønar- og setanarviðurskifti

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið.

### Umsókn

Umsókn við CV, avriti av prógvum og møguligum ummælum skal vera Havstovuni í hendi í seinasta lagi týsdagin **3. januar 2023**.

Umsóknin skal sendast við telduposti til ***starv@hav.fo*** - frámerkt **’Starv’**.

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

P.O. Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo